# Eingin miltbrandur í Føroyum

**Nú, meira enn ein mánaða aftaná yvirgangsálopini í USA, eru fleiri dømi um miltbrand staðfest í USA. Eisini runt í Europa hava fleiri fráboðanir um miltbrand verið, men talan hevur har ongantíð verið um veruligan miltbrand – heldur smádreingjalótir**

MILTBRANDUR
*Ingrid Bjarnastein*


*Onki verður gjørt við at kanna brøv fyri miltbrand á Postverki Føroya*

Ongin fráboðan um miltbrand er skrásett á politigarðinum í Havn. Postverkið hevur heldur ikki lagt seg eftir at gera nakað eyka burturúr, nú nøkur dømi um miltbrand hava verið staðfest í Sameindu tjóðunum.

– Tað er umráðandi ikki, at gera eina mús til ein fíl, verður sagt av politigarðinum í Havn. – Onki dømi um miltbrand hevur verið fráboðað her hjá okkum. Tí er tað týdningarmikið, at ikki blása støðuna upp, so borgarin verður bangin.

– Um tú fært eitt bræv, har tú hevur mistanka um, at miltbrandur kann vera í, skalt tú seta teg í samband við politiið beinanvegin, sigur Bergleif Brimvík av politigarðinum í Havn.

Danska Sundhedsstyrelsen hevur eisini sett nakrar reglar upp miltbrandi viðvíkjandi, og á politigarðinum hava teir eisini egnar reglar um ein fráboðan um miltbrand skuldi komið.

## Postverkið ger fyribils onki

Á Postverkinum er alt púra vanligt. Onki serligt verður gjørt av tí, at ongi dømi um miltbrand hava verið staðfest í Europa – enn.

– Vit hava samband við postverkið í Danmark, og halda okkum kunnugar við teir, sigur Mortan Rasmussen á Postverki Føroya.

– Ikki er lætt at gera nakað um talan skuldi verið um møguligar »kanningar« av brøvum, greiðir Mortan Rasmussen víðari frá. – Tað stendur í grundlógini, at vit hava ikki loyvi at kanna brøv, og dentur verður lagdur á, at brøvini, ið verða send, eru privat. Hetta er eitt bræv millum sendara og móttakara, og hava vit bert skyldu til at bera brøvini út.

Um eitt bræv skal kannast, má postverkið ella politiið hava dómaraváttan. Tí er ikki so lætt at fara undir nakra gjølla kanning av brøvum. Harumframt er tað nærum ómøguligt, at kanna øll brøv, tí Postverkið tekur sær av umleið 40.000 brøvum um dagin.

Danska Postverkið hevur sett seg í samband við myndugleikarnar í Danmark, og síggja teir onga grund til at gera nakað burturúr. Tí sær Postverk Føroya onga grund til at skapa óneyðuga øsing millum fólk.

– Fyribils verður onki gjørt við málið, men um postverkini í Europa herða eftirlitið við brøvum, so verður tað sjálvandi eisini gjørt í Føroyum, sigur Mortan Rasmussen. – Einasta ráðið, sum Postverkið hevur til fólk er at hava eygu og oyru opin. Nógv meira er ikki at gera júst nú.

## Miltbrandur ongantíð staðfestur í Føroyum

Sambært landslæknanum, Høgna Debes Joensen, er ongin tilburður av miltbrandi staðfestur í Føroyum yvirhøvur.

– Miltbrandur er ein ígerðarsjúka hjá menniskjum og djórum, sum kemur av bakteriuni Anthrax, greiðir Høgni Debes Joensen frá.

– Sjúkueyðkennini eru húðsár, lungnabruni, diaré og blóðeitran. Húðsárini eru sum oftast rivur í húðina. Um tað kemur fyri, at ein andar hetta hvíta pulvurið inn í seg, kann tað viðføra deyðiligan lungnabruna. Viðgerðin ímóti miltbrandi er pencilin við høgum skamti.

Miltbrandur smittar ikki frá menniskja til menniskja. Tað er bert um tú hevur verið í samband við sjálva bakteriuna, at tú gerst sjúkur.

Bæði politiið, Postverkið og landslæknin leggja áherðslu á, at møguleikin fyri miltbrandi í Føroyum er ógvuliga lítil. Dentur verður lagdur á, at fólk ikki kenna seg ótrygg, tí ongin grund er til tess.

Hans Johannus á Brúgv, Fiskasølan:

# Positivir yvirfyri privatisering

**Stjórin fyri Fiskasøluni, Hans Johannus á Brúgv, sær tað sum eitt stig tann rætta vegin at privatisera Fiskasøluna**

PRIVATISERING
*Heri á Rógvi*


*Hann Johannus á Brúgv kallar privatiseringina av Fiskasøluni fyri eitt stig tann rætta vegin.*

Í síðstu viku koma álitið um, hvussu landsins ognir skuldu privatiserast. Eisini kom eitt nýtt og meira torskilt føroyskt orð við í sama viðfangi.

Tá Sosialurin ringdi til Hans Johannus á Brúgv, so hevði hann ikki havt so øgiliga góðar møguleikar at kunna seg um nýggja álitið, men hann vísti á, at hetta við at privatisera ikki var nakar nýggjur tanki, sum tað jú heldur ikki er. Hinvegin er hetta fyrstu ferð, at landsins myndugleikar av álvara eru farnir undir at meta um og raðfesta almennar ognir í sambandi við møguligar privatiseringar.

Nýggja álitið býtir almennar ognir sundur í tveir bólkar, alt eftir nær tær eru búnar til at privatisera. Tað skal eisini sigast um álitið, at tað er rættiliga fyndug gjøgnumgongd, sum eisini gevur lesaranum eitt sindur av meirvitan.

Hugburðin er heilt greiður, og hann er, at almennar ognir eiga at verða privatiseraðar. Víst verður á í álitinum, at tað tykist sum um, at tað er breiður politiskur vilji aftanfyri ætlanirnar at privatisera landsins ognir.

## Positivir

Ein av teimum fyritøkunum, sum verður raðfest ovaliga á listanum yvir fyritøkur, sum kunnu privatiserast partvíst ella heilt longu áðrenn 2004, er Faroe Seafood ella Fiskasølan, sum hon vanliga verður roypt.

Stjórin fyri Fiskasøluna er eisini rættiliga positivir yvirfyri tankanum um at privatisera Fiskasøluna.

– Tað er eitt stig tann rætta vegin. Fiskasølan kundi fyri sovítt verið privatiserað í morgin, sigur Hans Johannus á Brúgv, stjóri.

Til spurningin um, hvat virði á Fiskasøluni er og hvør kundi hugsast at keypt, so metir hann, at tað er sera torført at svara uppá.

– Fiskasølan hevur havt eitt javnt yvirskot seinastu árini, men tað er spurningurin um tað er nokk. Verður Fiskasølan sett í tað rætta sambandi við aðrar liðir av søluketunum, so hevur Fiskasølan høgt virði, sigur Hans Johannus á Brúgv.

Hann vísir eisini á, at Fiskasølan kundi verið áhugaverd fyri føroyskar eins og útlendskar keyparar.



# Tryggja Fiskimálastýrið

**Tað skal gerast torførari at koma inn á Fiskimálastýrið. Hetta verður gjørt fyri at økja tryggleikan hjá starvsfólkinum**

TRYGD
*Edvard Joensen*


*Fyri at økja um trygdina hjá starvsfólkinum, verður tað gjørt torførari at koma inn á Fiskimálastýrið*
*Mynd. Álvur Haraldsen*

Glashurðar, sum skulu latast upp innanífrá, verða settar upp við inngongdina til Fiskimálastýrið. Hetta verður gjørt fyri at verja starvsfólkið móti óynskum vitjanum.

Yvirgangur úti í heimi, eins og órógvandi vitjanir í tinginum gera, at fólk fara at hugsa um, hvat kann henda teimum sjálvum. Tí vera slík tiltøk sett í verk, upplýsir Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, nú torførari fer at verða at sleppa inn á Fiskimálastýrið Yviri við Strond.

Gjørt verður klárt at seta glashurðar upp, sum eru háttaðar soleiðis, at bara tann, sum innan fyri er, kann lata tær upp. Soleiðis kann starvsfókið gera av, um tann, tey síggja uttanfyri, skal sleppa inn ella ikki.

Tað hevur sína orsøk, sigur landsstýrismaðurin, tí tað kemur fyri, at fólk eru í slíkari sinnisstøðu, at tey beinleiðis kunnu ræða starvsfólkini, sum taka í móti teimum.

Hann nevnir dømi, har maður hevur ringt til Stýrið og lovað at dripið, um hann ikki hevði fingið fiskiloyvi innan ásetta klokkutíð sama dag.

– Vit skulu sjávandi royna at skyna á, hvussu álvarsliga slíkt er meint, sigur Jørgen Niclasen. Men tað er klárt, at tann, sum fær eina slíka samrøðu, verður illa við.

Hann sigur, at tað ber í flestu førum til at finna út av, um hetta er vanligur taliháttur hjá fólki.

– Vit kenna teir flestu, sum koma her, og vita, hvussu orðalagið plagar at vera. Men tað er eingin verja í tí, tí tað má væl vera krav, at starvsfólkið verður viðfarið við vanligari fólkaligheit.

Hinvegin sigur Jørgen Niclasen, at tað er komið fyri, at hann hevur kannað hóttanir móti honum sjálvum. Hevur roynt at funnið fram til, hvør persónurin er, sum hevur lovað ilt yvir landsstýrismannin ella beinleiðis hótt við at kappa høvdið av honum.

Tað hevur hvørja ferð borið til at loyst slík mál, og ongantíð er tað komið so langt sum til at melda nakran, sigur Jørgen Niclasen.

Hann viðgongur tó at viðhvørt kunnu fólk gerast so ill í sær, at tað, tey siga og lova, kann kennast rættiliga ótespiligt. Serliga fyrstu tíðina fór djúpari, enn tað ger í dag, hóast tað framvegis sjálvandi verður tikið fyri fult, tá óðir menn hótta ein, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður.

# Eiga at vera varnir

**Tað er ikki skilagott at skráseta rækjuskipini í FAS bara tí, at prísirnir ikki passa í løtuni, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, sum sær fyri sær, at aðrir skipabólkar fara at biðja um tað sama**

STUÐUL
*Edvard Joensen*


*Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, hevur ongan hug at bera rækjuskipunum pengar aftur úr landskassanum, nú vit júst eru komin burtur úr øllum stuðlinum til fiskivinnuna*

Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum hevur ongan hug at lata rækjuskipini verða skrásett í FAS skipanini, tí rækjuprísirnir eru lágir, og oljuprísirnir høgir í løtuni. Avleiðingin verður, at aðrir skipabólkar koma og biðja um tað sama, fyrsta okkurt hóttafall hómast, sigur hann.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, sigur, at hann er einki fyri at fara aftur til at geva stuðul til fiskivinnuna, nú vit nýliga eru komin burtur úr hesum við stuðuli. Hann nevnir tað stuðul at lata partar av flotanum verða skrásettar í FAS. Tí tað merkir jú, at peningur verður borin aftur úr landakassanum til reiðaríið, vísir hann á.

Í tí aktuella førinum við rækjuskipunum, er talan um 28 prosent av umleið 100 milliónum, sum hýrurnar eru í løtuni.

– Tað er so tað, sigur landsstýrismaðurin. Men tá næsti bólkurin kemur, og tann triðji og so framvegis, kunnu milliónirnar skjótt gerast nógvar, væntar hann. Nú skulu vit bara halda høvdið kalt og ikki í panikki fara at geva stuðul til vinnuna, sigur hann.

Jørgen Niclasen sigur seg ikki fáa nervar av, at rækjuflotin letur so illa at í løtuni. Tí hasir prísirnir munnu ikki fara at halda, er hann ivaleysur í og vísir á, at rækjuprísurin er longu við at kvinka uppaftur. Og oljuprísurin man helst eisini fara at lækka aftur einaferð, uggar hann seg við.

Annars heldur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, ikki, at rækjuvinnan man vera so heilt galin at vera í kortini. Áhugin tykist í hvussu er ikki eiðasørur, tí tá loyvini skuldu gevast, vóru 33 umsóknir. Seinnu tíðina eru tvey brúkt og eitt spildurnýtt rækjuskip komin í flotan. Og fyri nøkrum døgum síðan var eitt skip selt til annað felag í landinum.

– Tað man ikki vera tí, at væntað verður, at tað verður ein beinleiðis undirskotsforrætning, at menn keypa rækjuskip, heldur Jørgen Niclasen.

Hann vísir á, at arbeitt verður við at fáa rækjuskipunum betri fiskirættindi. Serliga eru tað Kanada og Grønland, sum eru áhugaverd. Men eisini eystan fyri hava vit rættindi. Eitt nú frá russum. Men tað vísir seg, sum at tey økini eru ikki tey, sum skipini fyrst leggja seg á.

Jørgen Niclasen tekur aftur í aftur, at verður talan um eina beinleiðis undirskotsvinnu, noyðast vit sum frá líður at taka endaliga støðu til, hvat vit vilja við vinnuni. Um vit skulu gevast at fiska rækjur ella hava eina undirskotsvinnu, sum er grundað á stuðul, gangandi pemanent.

## Samráðingar eru í gongd

**Sildasamráðingarnar við norðmenn eru í gongd, og hinar fiskiveiðusamráðingarnar verða tiknar upp í næstum**

SAMRÁðINGAR

Samráðst verður í løtuni um sildaveiðuna við norðmenn. Og í komandi mánað fara tær flestu av hinum samráðingunum, føroyingar skulu hava við onnur lond um sínámillum fiskiveiðu, í gongd, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum.

Sildasamráingarnar eru enn ongan veg komnar sum so, sigur landsstýrismaðurin, hóast gongd er í. Enn er tað mest við at leggja vísindaligar upplýsingar og tílíkt fram, sigur hann.

Hinar samráðingarnar, sum verða við russar, ES, íslendingar og grønlendingar, verða allar í november og december. Uttan samráðingarnar við íslendingar, sum verða hildnar í januar komandi ár.

**ej**